# Badmintontúrur til Island februar 2018

HBF ætlar aftur hetta kappingarárið at skipa fyri eini ferð til Reykjavik International Games (RIG), har møguleiki er fyri at luttaka í badmintonkappingini.

Hesuferð verður túrurin ein dag longur enn undanfarna ár, frá hósdegi 01.feb. - mánadag 05. Feb. 2018, og sjálv kappingin er 03. og 4. februar í Laugardali í Reykjavík.
Les meira um RIG á heimasíðuni hjá www.rig.is

Kappingin er ein opin kapping, og er fyri allar leikarar frá U 13 – U 19. Ein lítil kapping hevur eisini verið fyri U 11 leikarum, men hendan er bert sunnudagin og eingin vinnari verður kosin. Øll fáa gullmedalju.

Túrurin er skipaður sum ein familjutúrur. Øll børn sum melda til, skulu verða knýtt at onkrum vaksnum persóni, hetta mugu leikararnir sjálvir syrgja fyri. HBF hevur venjarar og ferðaleiðara við, sum hava ábyrgd av túrinum og kappingini, men ikki av leikararnum.

Luttøkan krevur nógva planlegging og tí er umráðandi, at vit í HBF fáa afturmelding **í seinasta lagi 25. oktober** frá limum, sum hava áhuga í at luttaka á RIG.

**Gjald**
Leikararnir mugu sjálvir gjalda fyri túrin. Ein leys meting sigur, at túrurin kemur at kosta uml. 3500 kr. Vit eru sjálvandi øll áhugaði at túrurin verður so bíligur sum møguligt. Ein møguleiki er at samla pengar við at skipa fyri ymiskum tiltøkum. Hetta krevur nógva hjálp frá bæði leikarum og foreldrum og eru øll hugskot vælkomin.

**Tilmelding**
Tey sum hava hug at koma við til Íslands skulu melda seg til í Klubmodul, har kemur at liggja eitt leinki, allir limir fáa teldupost tá tilmeldingin er klár.

Plássini eru avmarkað og tí er at skunda sær. Skipanin sigur frá tá tað er fult teknað.

Tilmeldingin er bindandi og eitt depositum á 1000 kr verður kravt og skal gjaldast við tilmelding.

**Kunnandi fundur**
Seinni í november mánaði fer HBF at skipa fyri einum kunnandi fundi fyri teimum luttakarum og foreldrum, sum ynskja við til Íslands.

**Um tit hava spurningar hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja til Dortheu Thomsen á tlf. 211202 ella senda teldupost til havnarbadmintonfelag@gmail.com.**

BANKNORDIK